## Seat Cordoba



Cordoba, ið er Seat Ibiza í sedan útgávu, kemur nú við nýggjum modelli. Viðførisrúmið er vaksið við 30 litrum og er nú 485 litrar. Bilurin kemur á danska og føroyska marknaðin í vár.

*Kelda: FDM Motor*

## Nýggjur Micra



Ein heilt nýggjur Nissan Micra bleiv sýndur fram á Paris Motorshow av Nissan præsidentinum Carlos Ghosn. Bilurin er bygdur yvir sama plattform sum ein komandi Renault Clio.

*Kelda: FDM Motor*

## Peugeot Sesame



Peugeot Sesame er ein konseptbilur, ið vísir hvussu ein nýggjur Peugeot 107, sum kemur at avloysa 106, møguliga kemur at síggja út. Bilurin varð sýndur fram á Paris Motorshow, fyri at vita hvussu hann bleiv móttikin av almenninginum

*Kelda: FDM Motor*

# Peugeot 406 í Guinnes rekordbókina




*Heimsmetið bleiv sett við hesum silvurgráa Peugeot 406 HDi. John Taylor kláraði at koyra 34,69 km pr. litur*

**Peugeot 406 kemur nú í Guinnes rekordbókina sum tann bilur, ið hevur klára at koyrt longst við einari áfylling av brennievni. Heimsmetið bleiv sett við einum 406 HDi**

HEIMSMET
*Magnus Gunnarsson*

Peugeot 406 hevur sett heimsmet sum tann bilur, ið hevur klára at koyrt longst við einari áfylling av brennievni. Tað eydnaðist bilføraranum John Taylor, ið fyrr hevur sett fleiri evropeisk og australsk met, har hann hevur koyrt long strekkir við at brúka minst møguligt brennievni, at koyra 2348,3 kilometrar uppá ein tanga av dieselolju. Tað svarar til, at hann koyrdi 34,69 kilomterar pr. litur í hesum silvurgráa Peugeot 406 HDi sedan. Túrurin bleiv gjøgnumførdur á vanligum landsvegi við trimum vaksnum persónum og teirra viðføri. Guinnes observatørar vóru við allan túrin fyri at tryggja at tær strongu Guinnes reglurnar blivu yvirhildnar. Heimsmetið hjá John Taylor bleiv góðkent av Guinnes.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Audi S4 - við V8 motori og 344 hk



*Framman kennist S4 best av, at hann hevur størri luftinntak í kúfangaranum og síðuspeglum úr poleraðum aluminium*



*S4 hevur V8 motor við 344 hk, 18" alufelgur og tvey útstoyt aftan*

**Audi koma nú á marknaðin við nýggjum sportligum toppmodellum í A4 røðini. Talan er um S4, ið eins og forgangararnir, bæði fáast sum limousine og Avant**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

S4 líkist A4, men er ein annarleiðis sportligur bilar við t.d. 6-trins sportgirkassa, 18" alufelgum og permanentum Quattro fýrahjólstrekki og stramman aluminium undirvogni. Motorurin er ein 4,2 litur V8 við 344 hk, sum koyrir frá 0-100 km/t uppá 5,6 sek. Tað tekur einum S4 bert 20,6 sek. at koma uppá 200 km/t. Toppferðin verður elektroniskt avmarkað til 250 km/t. At síggja til eru tað bert smáar designbroytingar á muni millum ein vanligan A4 og ein S4. Til dømis er størri luftinntak í forkúfangaranum, Xenonforlyktir, síðuspegl úr poleraðum aluminium og tvey størri útstoyt í báðum síðum aftan.



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan´01, Km 35.000 .
Kr. 116.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg Aug´97, Km 120.000 .
Kr. 121.000.



**MITSUBISHI GALANT 1.8GLSI SPORT**
Árg Juni´92, Km 150.000 .
Kr. 35.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.3I 4H**
Árg Aug´98, Km 28.000 .
Kr. 112.000.



**JEEP CHEROKEE 2.5TD 5H**
Árg Juli´97, Km 80.000 .
Kr. 135.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg apr´95, Km 150.000 .
Kr. 60.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg Aug´99, Km 36.000 .
Kr. 90.000.

**GALLOPER 2.5TD**
Árg Aug-00, Km 50.000.
Kr. 183.000.



**Peugeot 405 2.0i stc**
F 52 506
Árg 1995, Km 67.000. Kr. 90.000.



**CITROÉN SAXO 1.5D**
Árg juli´97, Km 120.000.
Kr. 80.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo



**VW GOLF DIESEL**
Árg jan.87, Km 338.000. Diesel.
Avheintingar tilboð. Kr. 19.000.



**OPEL ASTRA 1,7 TD**
Árg apr.96, Km 119.000. Diesel .
Kr. 90.000.



**VW PASSAT TDI 115 HK**
Árg aug.99, Km 77.000. Diesel.
Kr. 179.000.



**FORD MONDEO 1,8I**
Árg nov.2000, Km 28.000. Bensin
Nýsýnaður. Kr. 148.000.



**BMW 316I**
Árg des.92, Km 168.000. Bensin.
Kr. 98.000.

**VW GOLF 1,8**
Árg mai.96, Km 76.000. Bensin.
Kr. 93.000.

Fleiri av bilunum eru til sølu til niðursettan prís

Audi SEAT
Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net



**FORD KA**
Árg 1998, Til sølu um hóskandi boð fæst. .
*Tlf. 210174*




